# Skúlabørn í deyðsfellu á Velb

**Tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn eitt barn liggur undir einum av mongu bilunum, sum við 80 km/t. strúka framvið smáu skúlabørnunum, sum skulu yvirum vegin á veg í frítíðarskúla á Velbastað**

FERÐSLA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Stórur var fagnaðurin, tá ið nýggi barnagarðurin og frítíðarskúlin á Velbastað varð tikin í nýtslu fyri góðum ári síðani. Men við nýggja stovninum kom eisini ein nýggjur trupulleiki. Tí vegurin framvið stovninum er framvegis skeltaður sum landsvegur, har loyvt er at koyra 80 km/t. Við nógva byggivirkseminum í bygdini er ferðslan bæði tung og vandamikil, samstundis sum sýnið hjá smáu skúlabørnunum er út av lagi vánaligt. Í roynd og veru er als onki sýni í svinginum har børnini skulu yvirum. Ikki bara á veg í og úr frítíðarskúla, men eisini í frítíðini, tá tey hittast á spæliplássinum.

Foreldrini í bygdunum báðum, Velbastað og Kirkjubø, hava stóran ampa á sær, tá børnini ganga niðan, og hava fleiri ferðir gjørt myndugleikunum vart við trupulleikan.

## Málið strandað

Staðbundna nevndin fyri Velbastað og Kirkjubø hevur gjørt vart við trupulleikan seinastu trý árini.

- Fýra ferðir árliga hava vit fund við umboð fyri kommuna. Hvørja ferð, málið hevur verið fyri, hava vit møtt stórari vælvild, men kortini hendir onki, sigur Brynhild Høgnadóttir, óttafull mamma og limur í staðbundnu nevndini.

Seinast nevndin var á fundi við býráðið var í november í fjør, og tá vóru boðini, at arbeiðið verður sett á eitt ráðfestingaryvirlit hjá kommununi.

- Men vit vita ikki, nær vit kunnu rokna við, at nakað hendir. Og tað er snøgt sagt ikki nøktandi fyri okkum, tí vit hava stóran ampa av at lata børnini ganga niðan í stovnin, sigur Brynhild Høgnadóttir. Hon greiðir



*Frítíðarskúlin, har eini 25 børn hvønn dag ganga til og úr, liggur omanfyri bygdina, har loyvt er at koyra 80 km/t. Í trý ár hevur staðbundna nevndin roynt at fáa kommununa at flyta bygdaskeltið*

Coca-Cola® Kappingin í Hondbólti

Vit ynskja vinnarunum av Coca-Cola® kappingini 2008 - hjartaliga tillukku



**Stjørnan**
Vinnarar av Coca-Cola® kappingini hjá kvinnum 2008



**Kyndil**
Vinnarar av Coca-Cola® kappingini hjá monnum 2008

SANSIR TEL 355 355 "Coca-Cola" and the design of the Coca-Cola Red Disc Icon are registered trademarks of the Coca-Cola Company. (C) 2000 The Coca-Cola Company. All rights reserved.